Eysturkommuna

# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 04.04.2024 kl. 17:00
**Málnr.:**

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar:** | | | |
| 14/24 | 24/00252-3 | Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024 | 2 |
| 15/24 | 24/00187-4 | 24/00187 - Stuðul til ritlist - Frágreiðing og tilmæli | 3 |
| 16/24 | 24/00261-1 | 24/00261 - frágreiðing og tilmæli til mál - Spæli - og trivnaðarpláss 2024 | 4 |
| | | | |

**Til viðgerðar:**

## 14/24 Frágreiðing og tilmæli - 24/00252 Eykajáttan apríl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 8/24 | 24/00252-3 |
| 2 Býráðið | 04.04.2024 | 14/24 | 24/00252-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir eykajáttanir.<br><br>Talan erum fleiri ymiskar eykajáttanir fyri íalt 9.215.000,00 kr., harav 7.945.000,00 kr eru til arbeiði sum eru sett gongd ella samtyjkt í 2023, men sum ikki eru liðug enn. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Samlaðu íløgurnar fyri 2024 hækkað við 9,2 mió. og samlaða RLÙ lækkar við somu upphædd. Men av tí a at 7,9 mió. vóru játtaðar í fjør verður gjaldføri ikki ávirkað av hesum partinum av eykajáttanini. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttanir samb. hjál. yvirlitið á íalt 9.215.000,00 kr. og at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**

Mæla til at veita eykajáttan samb. fyriliggjandi yvirliti

## 15/24 24/00187 - Stuðul til ritlist - Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 26.03.2024 | 12/24 | 24/00187-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 11/24 | 24/00187-4 |
| 3 Býráðið | 04.04.2024 | 15/24 | 24/00187-4 |

| Málslýsing: |
|---|
| **Rithøvundaspíri í Eysturkommunu**<br>Borgari í Eysturkommunu søkir um stuðul til ritlist. Søkt verður um kr. 500.000,-. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** 200.000 kr. eru settar av til satspuljuna 2024 (ritlist) av rakstrarkonto 522, stuðul til mentan. |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 26. marts 2024**
Mentanarnevndin mælir til stuðla hesi umsókn við 100.000 kr. Í hesum sambandi er ynskiligt, at lokal element skína væl ígjøgnum í arbeiðinum. Harumframt mælir mentanarnevndin til, at umsøkjarin fær umstøður til at skriva í Husinum hjá Karli í eitt tíðarskeið (skrivstovutíð, ikki innivist)

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at taka undir vi tilmælinum hjá mentanarnevndini.

## 16/24 24/00261 - frágreiðing og tilmæli til mál - Spæli - og trivnaðarpláss 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 21.03.2024 | 3/24 | 24/00261-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 02.04.2024 | 10/24 | 24/00261-1 |
| 3 Býráðið | 04.04.2024 | 16/24 | 24/00261-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru avsettar kr. 750.000 til íløgur í spæli – og trivnaðarpláss í kommununi.<br><br>Umsitingin hevur ynski um at gera trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt. Plássið talan er um, er ein partur av gøtuni, sum gongur framvið ánni. Plássið er gjørt ávegis liðugt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru avsettar kr. 750.000 á konto 52011 – Spæli – og trivnaðarpláss<br>Mett verður at kostnaðurin at gera trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt er kr. 350.000. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at gera  trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík liðugt og at Umhvørvis – og trivnaðarnevndin ger ein raðfesting av, hvat restina av peninginum skal brúkast til. |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 21. mars 2024**
Mæla til at eitt spælipláss verður gjørt undir Gøtueiði og at peningur til trivnaðarplássið norðanfyri skúlan / framvið Brúsá í Leirvík verður funnin á aðrari konto.

**Fíggjarnevnd 02. apríl 2024**
Mæla til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini, men at peningurin verður tikin av konto 61411 (Fríðkan)